

*– Eg var øgiliga óð, og ofta hugsaði eg: Tú gjørdi sjálvmorð, og tað gongur út yvir meg*

Tá er tað nógv betur at sleppa út og vera saman við góðum vinfólki.

## Øll hugdu

Teir seks dagarnir frá tí at Per varð funnin, til hann fór til gravar vóru sera langir. Erla tordi næstan ikki at fara út. Hon var heima frá handilsskúlanum á Kambsdali, har hinir næmingarnir gingu til hálvársroyndir.

– Tað var longi at bíða eftir jarðarferðini, tí alt stendur í stað.

Nógv fólk ringdu ella sendu smsboð til hana, men kortini kendi Erla seg øgiliga einsamalla. Hon stúrdi fyri, hvussu tað fór at verða at fara út aftur millum fólk – og ikki minst í skúla aftur.

Mánadagin aftan á jarðarferðina fór Erla aftur í skúla. Tá hevði hon verið heima í eina viku.

Næstan øll í flokkinum høvdu verið til jarðarferðina, so hon hevði heilsað upp á flestu teirra. Tað lætti um hjá henni tann morgunin hon kom aftur í skúla. Floksfelagarnir royndu sum frægast at lata sum onki, søgdu góðan morgun og smáprátaðu, men tað bar ikki til at káva út yvir syrgiliga huglagið.

Støðan batnaði so líðandi út á seinnapartin, men tá Erla og hini í flokkinum fóru til matarsteðg, merkti Erla veruliga, hvussu fólk hugdu at sær. Tá hon kom gangandi, fylgdu næmingarnir í hinum flokkunum henni við eygunum og tutlaðu sínámillum. Hvat tey søgdu, veit Erla ikki, men hon bæði sá og merkti tað.

– Tað var óbehagiligt, tí eg visti ikki, hvat tey søgdu, og tey hugdu so nógv.

Erla heldur hóast alt, at tað var lættari at koma útaftur, enn hon hevði væntað. At tað skyldast stuðuli frá góðum vinfólki og góðari familju, er hon ikki í iva um. Og hon heldur fram, at trúgvin á Gud hevur hjálpt og styrkt hana væl í sváru tíðini aftaná.

Stutt tíð var fráliðin, tá Erla byrjaði at hoyra søgur, sum vóru farnar at ganga. Ein var, at Erla skuldi vera við barn. Ein onnur var, at Per hevði tikið sítt lív, tí Erla hevði gjørt tað liðugt.

– Eg hoyrdi enntá, at vit skuldu havt gjørt tað saman, greiðir Erla frá og ristir við høvdinum.

Hon royndi at látast sum onki og ikki taka sær tykni av mongu søgunum.

## Broytti alt

Sjálvmorðið hjá sjeikinum hevur broytt Erlu nógv.

– Hetta hevur styrkt meg sálarliga. Eg eri eisini lívsglaðari, meira spontan og sosial, heldur Erla sjálv.

Hinvegin hevur tilburðurin eisini gjørt sítt til, at hon ikki orkar fyri, tá hon ikki fær fatur á fólki beinanvegin.

– Eg gerist alt fyri eitt ørkymlað, um eg ringi ella sendi sms boð til onkran, og tey ikki svara beinanvegin, men tað má eg sláa meg til tols við, staðfestir Erla.

Í dag hevur Erla Petersen tað gott. Hon er komin nakað víðari, men ofta spøkir tilburðurin við Peri aftur í huganum á henni. Onkuntíð hevur hon eisini droymt, at hon tosar við hann og spyr hann, hví hann gjørdi tað.

– Tá vakni eg, beint áðrenn hann svarar.

Erla hevur eisini hitt fólk, sum ikki vita, hvørjum hon hevur verið úti fyri. Hon hevur hitt fólk, sum hon ikki hevur sæð í longri tíð, sum hava spurt hana, um hon framvegis hevur sjeik.

– Nei, eg eri støk, sigi eg bara og royni at skifta evnið. Tí hitt hevði verið ov pínuligt – serliga fyri tey, ið ikki vita av tí.

Tað sama ger seg galdandi, tá tey í skúlanum hava kjak um ymisk etisk evni. Tá kemur sjálvmorð ofta fram sum eitt av evnunum. Tá velur Erla sera tilvitað at tiga, og hon heldur, at fólk eisini halda seg aftur undir tílíkum kjakum, tá hon er tilstaðar.

Fyrstu ferð Erla kendi, at gerandisdagurin var lætnaður, var, tá hon fór aftur í skúla eftir summarfrítíðina í fjør. Fólk høvdu vant seg við, at Erla var ein av teimum fólkunum í Føroyum, sum hevur upplivað at missa ein persón orsakað av sjálvmorði. Fólk høvdu fingið annað at tosa um, og Erla hevði lært seg at fara víðari við lívinum.

Hetta seinasta árið hevur hon lagt sjálvmorðið hjá Peri so mikið aftur um seg, at hon ikki longur hugsar um tað hvønn dag.

– Men tað fer at fylgja mær alt lívið, sigur Erla Petersen, sum aftan á summarfrítíðina hevur ætlanir um víðarilesnað í Danmark.

» *Eg hoyrdi, at vit skuldu havt gjørt tað saman*

» *Tað var óbehagiligt, tí tey hugdu so nógv*